tíðindablaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jóstinus L. Eldesgaard - Eyðun Klakksteín - Eirikur Lindenskov - Áki Bartholdsen

Útgevari, uppseting og prent: P/F Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Hava vit snorksovið og hevur BP ikki røkt sína skyldu!

Oddagrein

UM nakrar fáar mánaðir spríkir fyrsta oljan upp úr undirgrundini á tí sokallaða Atlantsmótinum te. nýggja oljuprovinsin millum Føroyar og Hetland. Fyrsta oljakeldan, Foinaven liggur bert fáar fjórðingar frá føroyska markinum og teinurin til Skotlands og til Føroya frá hesi kelduni er umleið tann sami.

ONGANTÍÐ áður hevur framleiðsla frá eini oljukeldu verið so nær føroyskum øki. Og tí er bæði rætt og náttúrligt at seta sær spurning in: hvussu hevur ein hugsað sær at tryggja seg mótidálking av okkara umhvørvi! Tað er stóra bretska oljufelagið BP, sum stendur fyri nýggju oljukelduni, og tí hevur hetta felag fulla ábyrgd av trygdini í sambandi við dálking av umhvørvinum. Sosialurin hevur í dag samrøðu við ein av umboðsmonnunum hjá KIMO, sum er ein umhvørvisfelagsskapur við lokalum myndugleikum í fleiri londum sum limum. Hesin undrast stórliga á, at føroyskir myndugleikar ikki hava givið hesum vanda ans. Hvørki landsstýrismaðurin í umhvørvismálum ella Vaktar- og Bjargingartænastan høvdu givið sær far um vandan, tá hesin hetlendingurin tosaði við umrøddu partar. Síðani er tað komið fram, at ein ætlan/frágreiðing, sum BP hevur gjørt um dálkingarvandan frá oljukeldunum vestan fyri Hetland, ongantíð er komin føroyskum myndugleikum í hendi. Hetta vilja bløð í Skotlandi vera við.

TAÐ eru tey, sum halda, at tað er hysterí at gera ov nógv burtur úr dálkingarspurningum. Men hesi eru tíanbetur fá. Tí einki er at ivast í, at slíkt mál sum hetta eigur at verða tikið í størsta álvara, og tí er tað einki minni enn ein "skandala" at føroyskir umhvørvismyndugleikar ikki hava gjørt sær henda nýggja dálkingarvanda greitt. At BP ikki hevur latið føroyingum umrødda tilfar er undir allan kritikk. Kanska tað liggur hjá danska Miljøstýrinum og er ikki komið longur eins og tað var galdandi við Brent Spar málinum.

LEIÐARIN á Vaktar- og Bjargingartænastuni eftirlýsir í dag í Sosialinum teirri nógv umrøddu tilbúgvingarætlanini, sum skal forða fyri teimum ringastu avleiðingunum av eitt nú stórari oljudálking. Hesin stovnur, sum annars hevur ábyrgdina av at skula rudda upp eftir slíka vanlukku, hevur hvørki útgerð ella fólk til at gera hetta týdningarmikla arbeiði.

HVUSSU og ikki, so tykist tað fyri okkum at vera ógvuliga løgið, at landsstýrið saman við oljuráðleggingarnevnd og við VBT ikki fyri langari tíð síðani hevur tikið hetta mál í størsta álvara ts. umrøtt tað og kontaktað tey feløg, ið eru við í oljuframleiðsluni, sum byrjar stutt frá markinum um fáar mánaðir. Hetta er eitt alt ov álvarsligt mál til at verða so illa viðfarið.

Sosialurin

Viðmerking

Uttanríkispolitikkur

Hesa seinastu vikuna hava høvuðstíðindini í føroysku fjølmiðlunum snúð seg um uttanríkispolitisk mál.

Fyrst bræv løgmanns til formann Fólkatingsins, Erling Olsen, viðvíkjandi spurninginum um skipan av ríkisráði, síðani svarið frá formanninum í ES-nevndini, Jacques Santer, til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi samstarvinum millum Føroyar og ES, og at enda vitjanin hjá Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharra her grækarismessudag.

Bræv løgmanns

Brævið hjá løgmanni fari eg ikki at gera tær nógvu viðmerkingarnar til, tí eg kenni ikki viðgerðina av hesum máli í landsstýrinum, og tí heldur ikki orsøkina til, at løgmaður málber seg, sum hann ger. Men eg skal viðganga, at eg gjørdist ikki sørt kløkk av orðing løgmanns.

Sjálvt um eg ikki haldi tað vera rætt ella vera tann stóra lukkan bert at fara úr ríkisfelagsskapinum, einum felagsskapi vit uppá gott og ilt hava verið partur av í meira enn sekshundrað ár, so er mín hugsan, at rætta gongdin má vera fyri okkum at stremba móti sjálvbjargni og sjálvræði.

Vit hava havt heimastýrisskipan í 50 ár, og sjálvt um henda skipan hevur verið góð og hevur givið okkum møguleikar at mennast, so er tíðin komin til, at vit fáa aðra skipan, har vit hava avgerðarrætt og ábyrgd í øllum viðurskiftum. Hetta kann gerast við eini Sjálvstýrislóg.

Eg eri fullkomiliga ósamd við løgmanni í tí, at vit skulu knýta okkum tættari at Danmark.

Sum sagt veit eg ikki, hví løgmaður málber seg, sum hann ger, men henda spurning fara okkara fólk í landsstýrinum vónandi at gera viðmerkingar til.

Bræv Santers

Næsta stórmálið á uttanríkispolitiska økinum hesa vikuna er svar Santers til løgmans viðvíkjandi samstarvinum millum Føroyar og ES. Ikki kann sigast, at hetta er stuttligur lesnaður.

Fyrsti partur í brævinum umrøður grundarlagið fyri samstarvinum, og her verður víst bæði til grein 34 í ES-sáttmálanum, sum inniheldur lyfti um betran av sølumøguleikunum hjá føroyingum í ES, og til felagslýsingina viðvíkjandi endurskoðan av handilssáttmálanum í sambandi við limaskap hjá EFTA-londum.

Síðani kemur, vil eg siga, gremj um, at ES er fyri vanbýti í samhandlinum við Føroyar, á teirra neyðardýr! Men teir hava nú verið so fittir, at teir hava skotið upp frihandil við fiskafingrum. Men annars ber stórt sæð einki til, og at broyta listan við viðkvæmum fiskavørum ber als ikki til. Hesin listi ljóðar sum er tað ein natúrlóg.

Og at enda sum rosinan í pylsuendanum kemur, at skulu vit gera okkum nakrar tankar um øktan samhandil við ES, so mugu vit samstarva við ES, har vit eiga fiskirættindi á fjarleiðum.

Vitjan uttanríkisráðharrans

So var tað triðja stóra uttanríkispolitiska hendingin: Vitjanin hjá danska uttanríkisráðharranum, Niels Helveg Petersen, grækarismessudag.

Vónandi hava ráðharrin og landsstýrið ymiskt at tosa um, sum ikki er komið alment fram. Men tað, sum dentur er lagdur á í sambandi við vitjanina, eru viðurskifti okkara við ES.

Tá vit í 1989 til 1991 samráddust við ES um handilssáttmálan, gekk ógvuliga trekt, og eg haldi meg ikki minnast skeivt, at grein 34 í sáttmálanum, sum er nevnd í brævinum hjá Santer, var við til at fáa okkum at taka av.

Í dag fingu vit at vita frá sama ministerii, sum samráddist okkara vegna, at henda grein kann ikki brúkast til nakað sum helst, og eftir tí uttanríkisráðharrin sigur, so er sáttmálin, vit hava við ES næstan ikki tað pappír vert, hann er skrivaður á. Hann legði dent á, at danir kunnu einki gera fyri at bøta um hetta.

Undir samráðingunum millum føroyingar og danir 12. oktober 1993 løgdu vit føroyingar stóran dent á, at fáa við í avtaluna møguleikar fyri tiltøkum, sum kundu fremja virksemi og inntøkumøguleikar hjá okkum, og tí vóru vit væl nøgd við tað punktið í avtaluni, har danir átaka sær at virka fyri at bøta um handilsmøguleikar okkara við ES. Eftir okkara meting átóku danir sær við hesi avtalu eina skyldu.

Men nú fáa vit føroyingar at vita, alt hetta er einki vert! Skulu føroyingar gera sær nakra vón um at fáa frægari sømdir í ES, so mugu føroyingar sjálvir orðna hetta.

Hørførð fyri ES?

Vit føroyingar hava seinastu árini havt nógvar trupulleikar, og tað, sum hent er hesi ár, hevur gjørt okkum øll meira og minni paranoid. Vit halda við rætti ella órætti, at onnur hava ætlanir við okkum, sum vit einki vita um og ikki ynskja.

Eg havi hildið megh oyra til tey minni paranoidu, men eg má viðganga, at hendingarnar seinastu vikuna, serliga í sambandi við ES-viðurskifti okkara, fáa meg at halda at her er okkurt, sum ikki er heilt tilvildarligt.



Fyrst fáa vit í brævinum frá Santer at vita, at handilssáttmálin við ES ikki gevur nakrar møguleikar fyri menning av samstarvinum, síðani fer løgmaður út og greiðir fólki frá, hvussu negativt svarið hjá Santer er, og at hetta vísir, at sáttmálin ikki kann nýtast til nakað sum helst, og at enda kemur Niels Helveg Petersen og sigur, at her er eingin vón fyri nøkrum.

Er hetta tilvildarligt, ella er hetta alt liðir í eini propagandaherferð at fáa okkum inn í ES á ein ella annan hátt? Eg spyrji bara.

Nú vita vit øll, at løgmaður gongur inn fyri, at Føroyar gerast limir í ES, og tað skal hann hava loyvi til at meina. Men so leingi hann situr sum løgmaður fyri hesi samgongu, sum er ímóti, at Føroyar gerast limir í ES, so kann hann ikki loyva sær at føra onnur sjónarmið fram, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

Marita Petersen

BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666

Eg stjól ikki bilin

Í seinastu viku stóð ein lítil tíðindagrein, um ein 17 ára gamlan drong, sum kom sera væl frá einum ferðsluóhappi í Eysturoyarbergholinum. Hann koyrdi sjálvur bilin.

Í blaðnum stóð, at hesin ungi maðurin hevði stolið bilin.

- Tað segði eg í fyrstuni, men eg havi greitt politinum, at eg hevi lænt bilin, og tað hevur hann, sum átti bilin eisini váttað.

Einasta meinið, hann fekk, var, at annað oyrað skrædnaði eitt sindur.

Nú tað kemur fram, at drongurin hevði lænt bilin, sleppur hann undan skuldseting fyri brúksstuldur.

Drongurin sigur, at hann dugdi væl at koyra. Tað var ikki tí, óhappið hendi. Eftir hansara fatan var okkurt galið við bilinum.

randi